# Ótti fyri miltbrandi á Sandi

**Fríggjamorgunin fekk gistingarhúsið á Sandi eitt illgrunasamt bræv. Løgreglan varð boðsend, og brævið er sent Seruminstituttinum í Danmark til nærri kanningar, tí løgreglan óttaðist miltbrand**

MILTBRANDUR
*Stefan í skorini*

Óttin fyri herviligu sjúkuni miltbrandi breiðir seg um allan heim. Fólk hava fingið boð frá myndugleikunum um at vera varin við øllum posti og at vera á varðhaldi, um tey varnast okkurt illgrunavert.

Fríggjadagin bar postboðið á Sandi gistingarhúsinum Ísansgarði eitt bræv, har eingin avsendari var á,



*Ísansgarður á Sandi fekk fríggjamorgunin eitt illgrunavert bræv, sum er sent niður til Danmarkar til nærri kanningar*

og brævið tóktist sum heild at vera heldur løgið.

Tí varð løgreglan boðsend beinanvegin. Hon tók í samráð við løgregluna í Havn avgerð um at senda brævið til Seruminstituttið í Danmark til nærri kanningar.

Brævið varð sent úr útlandinum, og eingin avsendari stóð skrivaður á tað. Tí kendu tey á gistingarhúsinum seg ikki trygg við at lata brævið upp. Tað varð tí forseglað og sent av landinum aftur.

Ingibjørn Eldevig, sýslumaður á Sandoy, sigur, at tey hildu seg til tær mannagongdir, sum landslæknin og løgreglan hava ásett í sambandi við illgrunasom brøv og pakkar, sum kunnu innihalda miltbrandsbakteriuna.

Ingibjørn sigur tó, at talan kanska er um eitt heilt vandaleyst bræv, men tað er best at vera varin við slíkum, áðrenn ein kann siga við vissu, at talan ikki er um bakteriu ella annað vandamikið innihald.

Sama dag varnaðust starvsfólk á posthúsinum í Havn, at hvítt pulvur datt úr fleiri brævbjálvum. Hetta er neyvan nakað vandamikið, men bara onkur, ið vil ræða fólk. Tó eru hesi brøvini eisini send til kanningar í Danmark.

# Fóru til hendurs á Hovsegg

**Fríggjanáttina fóru tveir ávirkaðir ungir menn til hendurs uppi á Hovsegg. Annar endaði á sjúkrahúsinum til kanningar**

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Fríggjanáttina, tá klokkan nærkaðist fýra á nátt, fekk løgreglan á Tvøroyri eina fráboðan um harðskap, sum var farin fram á vegnum uppi á Hovsegg.

Tveir vóru komnir til ilnar og fóru eisini til hendurs. Menninir vóru báðir ávirkaðir av rúsdrekka, tá hendingin fór fram. Annar hevði sligið hin so illa við nevanum í andlitið, at hann mátti á sjúkrahúsið til kanningar, men hann fekk tó ongan stórvegis skaða. Teir báðir eru miðskeiðis í 20-unum.

Teir vóru í einum bili við fleiri fólkum og koyra suðureftir. Førarin steðgar bilinum, tá menn aftanfyri eru komnir til ilnar. Teir fara so út og fara teir til hendurs.

Løgreglan var ikki á staðnum, men tosaði við persónin, sum endaði á sjúkrahúsinum. Hesin hevur greitt frá, hvør tað var, sum framdi harðskapin móti sær, men løgreglan hevur enn ikki tosað viðkomandi.

### Ferðsluóhapp í Froðba

Leygarkvøldið hevði løgreglan í Suðuroy eitt ferðsluóhapp at taka sær av. Tað var ein ungur maður, sum var farin útav vegnum í Froðba. Hann var einsamallur í bilinum, tá hann koyrdi úteftir.

Maðurin fekk ikki stóran skaða, og bilurin er nakað farin. Løgreglan sigur seg ikki kenna orsøkina til óhappið enn. Tó eru blóðroyndir tiknar av manninum, og tí ber til at fáa staðfest, um hann var ávirkaður av rúsdrekka.

# Nim tikin við ov nógvum gørnum

**Sunnudagin tók vaktarskipið Brimil línuskipið Nim av Tvøroyri, sum nú liggur við bryggju í Havn. Tvøroyrarbáturin varð tikin fyri at hava sett ov nógv gørn**

FISKISKIP
*Stefan í Skorini*

Sunnudagin var línuskipið Nim á garnaveiðu eftir havtasku sunnanfyri Føroyar við Føroyabanka, tá nýggja vaktarskipið Brimil kom umborð at kanna skipið.

Tað vísti seg eftir øllum at døma, at Nim hevði sett ov nógv gørn. Reglur eru nevniliga fyri, hvussu nógv gørn eitt skip hevur loyvi at



*Sunnudagin varð línuskipið Nim av Tvøroyri tikið fyri at hava sett ov nógv gørn. Brimil kom við skipinum á Havnina mánamorgunin, og her liggja tey bæði við bryggju*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

seta í senn.

Hetta hevði við sær, at Brimil gav Nim boð um at sigla við til Havnar. Hagar komu skipini mánamorgunin.

Enn eru avhoyringar og kanningar ikki lidnar, og tí ber ikki til at siga, um reiðaríið fer at taka við eini bót, ella um málið fer longur enn so.

# Venjing í Klaksvík eydnaðist væl

VENJING
*Stefan í Skorini*

Leygardagin seinnapartin varð boðað frá einum óhappi á oljubryggjuni á Grótrætt norðanfyri Klaksvík.

Froskmenn, sløkkilið og sjúkrabilur fóru beinanvegin á staðið at kanna, hvat var áfatt. Ein bilur var farin á sjógv, og ein persónur var í bilinum.

Froskmenn fóru fyrst niður eftir manninum, og síðani varð bilurin tikin uppaftur við krana. Maðurin varð fluttur á sjúkrahúsið til kanningar.

Talan var bara um venjing, sum teir luttakandi ikki vistu av frammanundan. Sagt verður úr Klaksvík, at venjingin eydnaðist væl, og at allir partar stóðu royndina.

Tað er kanska ikki av tilvild, at vant varð við einum bili, ið var farin á sjógv. Seinastu vikurnar hava tvær slíkar hendingar verið í Klaksvík, og tær hava givið løgreglu og sløkkiliði mikið høvuðbrýggj, tí fólk ikki hava boðað løgregluni frá, eftir at bilurin er farin á sjógv.

# Fór eftir øli og brennivíni

**Leygarnáttina var aftur innbrot á eystara armi á Skálafjørðinum. Hesuferð var tað John´s Restaurant í Saltangará, ið stóð fyri skotum, men bara øl og brennivín varð tikið**

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Hetta er triðja vikuskiftið upp í slag, at løgreglan í Runavík kannar innbrot í økinum. Innbrotini eru brádliga vorðin fleiri í tali enn áður.

Hetta innbrotið fór fram leygarnáttina millum klokkan ellivu á kvøldi og klokkan tíggju á morgni.

Gerningsmaðurin hevur brotið bakdyrnar upp við einum kúbeini, og er soleiðis sloppin inn í matstovuna, sum fyrr kallaðist Stokkastovan.

Tjóvurin hevur ikki tikið nógv við sær. Einar tíggju fløskur av øli og nakað av brennivíni. Gerningsmaðurin hevur tikið øli við sær, men brennivínið hevur hann drukkið og tveitt fløskuna frá sær á gólvið. Eingin peningur varð tikin.

Løgreglan heldur, at ein einstakur persónur stendur fyri innbrotinum, tí so lítið varð tikið við úr matstovuni.

Hesar seinastu vikurnar hevur innbrot verið í málingahandlinum Litaval, har 10.000 krónur vórðu tiknar, Keypssamtøkuni, kioskini Bonus og nú í John´s Restaurant. Tvey av hesum innbrotum eru uppklárað.



# Berføtt bjarging



*Smyril hevur fýra bátar av nýggja slagnum í hvørjum borðinum. Hvør bátur tekur 101 fólk*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Royndin við nýggju bjargingarútgerðini á Smyrli mánadagin vísti, at okkurt smávegis er at hjálpa uppá, áðrenn útgerðin kann brúkast optimalt**

BJARGINGAROYND
*Edvard Joensen*

Turrskødda bjargingin, sum hon verður nevnd, gjørdist til berføtta bjarging, tí sjógvur var í bjargingarbátinum. Og á veg niður hingu nøkur av fólkunum, sum bjargast skuldu, føst.

Nýggja bjargingarútgerðin, sum Strandferðslan setir í skipini, er kortini ein munandi bati sammett við tað, vit kenna frammanundan. Men okkurt er, sum rættast skal, áðrenn útgerðin kann gera optimala nyttu, sum hon er ætlað til.

Fyrrapartin í gjár var bjargingarroynd umborð á Smyrli, sum lá við bryggju í Havn. Manningin varð lærd, hvussu hendan nýggja útgerðin skuldi brúkast, og saman um tikið gekk royndin væl, hóast okkurt er at bøta.

Blaðmaðurin, sum slapp ein túr gjøgnum sliskuna niður í stóra gummibátin, gjørdist vátur um beinini og eitt sindur um endan eisini, tá hann kom sendandi niður í bátin, sum eittt sindur av sjógvi var komin í.

Tað gekk annars ikki so heilt lætt at koma niður í bátin, sum ætlað var frammanundan,

Manningin fekk í frálæruni at vita, at øll, sum fóru í bátin, skuldi vera í bjargingarvesti, og tað gjørdu fólk so.

Men skjótt vísti seg, at fólk stóðu føst á veg niður, og tað er jú ikki so gott.

Tá túrurin so kom til blaðmannin, sum eisini skuldi royna, høvdu teir funnið út av, at helst vóru tað bjargingarvestarnir, sum vóru ov illa egnaðir til sliskuna, ið gongur av skipinum niður í bátin, sum gjørdu, at fólk hingu føst.

Eg varð tí biðin um at fara úr aftur vestinum og síðan lata meg glíða niður. Men tað gekk heldur ikki skjótari enn so, at eg stóð fastur tríggjar ferðir á veg niður.

Sliskan, sum gongur av bátadekkinum á Smyrli niður i bátin, er innan skapað sum ein spiral, har tann, sum fer ígjøgnum, koyrir runt. Í hesum svingunum var so mikið trongt, at tað stóð á og neyðugt var at snara sær á og hjálpa til fyri at koma víðari. Seinasta pettið, sum var beint, gekk tað heilt skjótt, og tann, sum skuldi taka í móti í bátinum, var ikki heilt til reiðar, so móttøkan var eitt sindur óvæntað.

Farið varð úr skónum, áðrenn farið varð av skipinum, og tað fyrsta, sum lagt varð til merkis í bátinum var, at neyðugt var at skifta hosur, fyrsta komið var umborð aftur.

Fleiri teirra, sum undan vóru farin í bátin, søgdu frá,a t bjargingarvestarnir hingu fastir, og tey hildu viðhvørt, at um heilt illa vildi til, kundi ein, sum ikki hugsaði klárt í slíkari støðu, kvalast.

Menn frá danska Søfartsstyrelsen vóru við til royndina, og teir søgdu, at teir høvdu eisini havt ávísar trupulleikar við bjargingarvestum umborð á Bornholmaraskipunum. Men tað varð loyst við at fáa nýggjar bjargingarvestar. Hesir vóru av sama slag, sum summir teirra, ið Smyril longu hevur, og hildu teir tí, at um allir vestarnir vóru skiftir til hetta slagið, skuldi ikki verið nakar vandi í so máta.

At sjógvur var í bátinum komst av, at tá hann varð tveittur út, fór hann undir, og meðan hann blástist upp, kom eitt lítið sindur av sjógvi í hann.

Men alt í alt er framstigið rættiliga stórt. Munur er á at koma beinleiðis niður í ein øgiliga stóran bát, sum altíð vendir rætt, og at noyðast at loypa í ein lítlan bát við einum holi, sum tú kanska rakar - og helst ikki - við tí úrlsiti, at tú endar á sjónum, og verður ígjøgjum, allur sum tú ert. Tá er hóast alt léttari at skifta hosur.



*Teir fýra bátarnir leggja seg lið um lið, longu meðan teir verða blástir upp. Gongt er millum allar fýra bátarnar*
*Mynd: Edvard Joensen*

# SPD vann stórsigur í Berlin

**Kristiligi demokratiski flokkurin CDU var fyri størsta ósigrinum í floksins søgu.**

Sosialdemokratiski flokkurin hjá Gerhard Schröder, samveldiskanslara skal sita við róðrið í Berlin tey næstu fýra árini, og spurningurin er bert, hvør skal stýra saman við teimum. Valúrslitið ger, at SPD kann velja ímillum fríu demokratarnir FDP, Tey Grønu og fyrrverandi eysturtýsku kommunistarnar PDS.

Enn hevur sosialdemokratiska leiðslan ikki boðað frá, hvørjum hon ætlar at samstarva við, men eygleiðarar í týska høvuðsstaðnum siga, at talan verður annaðhvørt um PDS ella eina samgongu, har bæði FDP og Teir Grønu eru



*Gerhard Schröder og flokkur hans vann valið í Berlin*

uppií.

Á valinum sunnudagin fingu sosialdemokratarnir 30 prosent av atkvøðunum ímóti 22,4 prosentum á valinum seinast.

### Vanlukka hjá CDU

Stóri taparin var kristiligi demokratiski flokkurin CDU. Flokkurin hevur tann størsti í Berlin, síðani múrurin fall, men sunnudagin var tað CDU, sum fall. Flokkurin fekk 23 prosent av atkvøðunum ímóti 40,8 prosentum á seinasta vali, sum var í 1999.

Úrslitið ger, at CDU og teir gomlu kommunistarnir PDS eru at kalla javnt stórir í Berlin.

Forkvinnan í CDU, Angela Märkel, segði sunnukvøldið, at úrslitið í Berlin hevur onga ávirkan á støðu floksins í Týsklandi sum heild, men politiskir eygleiðarar ivast ikki í, at tað sera vánaliga valúrslitið í høvuðsstaðnum fer at fáa nógvar CDU-limir at spyrja, um hon er tann rætta til formansstarvið. Eygleiðararnir halda eisini, at eftir ósigurin í Berlin verður tað neyvan Angela Märkel, sum fer at royna seg sum kanslaraevni hjá CDU ímóti Gerhard Schröder.

Gomlu samstarvsfelagarnir hjá CDU, fríu demokratarnir í FDP, høvdu hinvegin eitt gott val í høvuðsstaðnum. Flokkurin fekk tíggju prosent av atkvøðunum, sum er besta úrslitið, sum flokkurin hevur havt í Berlin síðani 1954.

## Sellafield-eigararnir í fíggjartrupulleikum

Almenna bretska kjarnorkufelagið British Nuclear Fuels Limited, sum eigur tað umstrídda endurvinningarvirkið í Sellafield, er á eggini til húsagang.

Blaðið The Sunday Telegraph skrivaði sunnudagin, at stjórnin í London verður fyrsta dagin noydd at boða frá, at kjarnorkufelagið hevur mist allan eginpeningin. Felagið eigur m. a. Sellafield-verkið, sum hevur verið fyri hvøssum atfinningum, eftir at kanningar ymsastaðni hava staðfest, at geiðslavirkið útlát frá verkinum dálkar havleiðirnar illa.

Sambært The Sunday Telegraph hevur leiðslan í British Nuclear Fuels Limited biðið stjórnina átaka sær fleiri av teimum fíggjarligu ábyrgdunum hjá felagnum. M. a. hevur felagið bundið seg til at rudda eftir sær, og bara tær útreiðslurnar eru mettar til einar 700 milliardir krónur. Ta uppgávuna maktar felagið als ikki, skrivar The Sunday Telegraph, sum heldur seg vita, at eginpeningurin hjá felagnum er tríggjar milliardir krónur.

Leiðslan í kjarnorkufelagnum bað herfyri myndugleikarnar stovna serligt felag til at taka sær av ruddingini, men enn hevur stjórnin ikki svarað uppskotinum.